Munnligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Eyðgunn Samuelsen, løgtingsmaður

Svarari: Sólvit E. Nolsø, landsstýrismaður í almannamálum

Evni: Talsfólk á brekøkinum

Spurningar:

1. Arbeiðir landsstýrismaðurin við at seta eitt talsfólk á brekpolitiska økinum?
2. Um so er, nær kann væntast, at klárt er at seta talsfólkið?
3. Hvar verður talsfólkið staðsett?

Viðmerkingar:
Tað eru nú fleiri ár síðan, at MEGD ynskti, at eitt talsfólk verður sett at umboða borgarar, ið bera brek. MEGD hevur áhaldandi víst á, at okkum tørvar ein mannarættindastovn í Føroyum, ið kann hava eftirlit við ST-sáttmálanum um rættindi teirra, ið bera brek. Fyrsta stig er at seta eitt talsfólk á brekøkinum.

Vit hava m.a. lógina um almannatrygd og tænastur, ið tekur støði í prinsippunum í breksáttmálanum um sjálvsavgerðarrættin. Henda lógin er farin at virka, og tí er tað eisini tiltrongt at fáa sett talsfólkið. Talsfólkið kann vísa á manglar og rættindi hjá fólkum, ið bera brek, og harvið gera vart við, hvørjar tænastur mangla.

Samgonguskjalið hjá hesari samgonguni hevur ásetingar um hetta, men ivi hevur verið um, hvar uppgávan liggur og hjá hvørjum landsstýrisfólki. Í fjør var uppgávan staðsett hjá landsstýrisfólkinum í almannamálum.

Tað hevur stóran týdning, at talsfólkið er óheft av útinnandi myndugleikanum.

Fyri at fáa staðfest, hvussu langt hetta málið er komið, og nær talsfólkið verður sett, verða hesir spurningar settir.

Á Løgtingi, 22. mars 2022

Eyðgunn Samuelsen